# P/F VÁGA FLOGHAVN

## SØRVÁGUR

## ÁRSFRÁSØGN

## 2008

## INNIHALDSYVIRLIT


Síða

**Leiðslufrágreiðing v.m.**

Upplýsingar um felagið ..... 2

Leiðslufrágreiðing ..... 3 - 5

Høvuðs- og lyklatøl ..... 6

**Átekningar**

Leiðsluátekning ..... 7

Átekning frá óheftum grannskoðara ..... 8

**Ársroknskapur 1. januar – 31. desember 2008**

Rakstrarroknskapur 2008 ..... 9

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2008 ..... 10 - 11

Gjaldførisfrágreiðing ..... 12

Notur ..... 13 - 15

Nýttur roknskaparháttur ..... 16 - 19

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vága Floghavn<br>FO-380 Sørvágur | |
| | Telefon: | 354400 |
| | Telefax: | 354401 |
| | Heimasíða: | www.floghavn.fo |
| | Teldubústaður: | floghavn@floghavn.fo |
| | V-tal: | 566.713 |
| | Skrásetingar-nr. | 4800 |
| | Stovnað: | 14. juni 2007 |
| | Roknskaparár: | 1. januar – 31. desember |

**Nevndin**

Kitty May Ellefsen, formaður
Jóhannus Egholm Hansen, næstformaður
Bárður á Steig Nielsen
Evy Jacobsen
Jóhan í Niðristovu

**Stjórn**

David Reinert Hansen, forstjóri
Finnbogi Niclasen, stjóri

**Grannskoðan**

**Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT***
løggilt grannskoðaravirki
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 - Telefax: 31 38 15
Teldubústaður: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann

______________
fundarstjóri

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

**Virksemi**
Við heimild í løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 2007 varð P/F Vága Floghavn stovnað á aðalfundi tann 14. juni 2007. Endamálið við felagnum er at reka floghavnsvirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.

Í løgtingslógini hevur landsstýrismaðurin fingið heimild at umleggja virksemi hjá Vága Floghavn í partafelag og at hækka partapeningin í felagnum við 365 mió. kr. til útbygging av flogvøllinum.

Fyrru helt av 2008 hava Vinnumálaráðið og P/F Vága Floghavn arbeitt við at umleggja virksemi hjá Vága Floghavn yvir í P/F Vága Floghavn. Herundir at flyta starvsfólkini yvir í felagið. Arbeiðið varð liðugt tann 24. juli 2008, tá eykaaðalfundur varð hildin í felagnum.

**Yvirtøka av Vága Floghavn og innskot av partapeningi**
Á eykaaðalfundi í felagnum tann 24. juli 2008 varð Vága Floghavn og alt virksemi hennara innskotið í felagið sum partapeningur fyri eitt virði uppá kr. 414.318.200 og útskrivaði felagið partabræv á 100 mió.kr. til kurs 414,3182.

Roknskaparliga bleiv yvirtøkan framd við virknaði frá 1. januar 2008. Sosatt yvirtók felagið rakstrarhallið hjá Vága Floghavn í tíðarskeiðnum 1. januar til 24. juli 2008.

Nevndin í P/F Vága Floghavn varð sama dag vald av nýggjum og ístaðin fyri Árna Arge og Andrass Róin komu Jóhannus Egholm Hansen og David Reinert Hansen í nevndina. Nevndin skipaði seg aftaná aðalfundin við Kitty May Ellefsen sum forkvinnu og Jóhannus Egholm Hansen sum næstformanni.

Tann 1. oktober 2008 tók David Reinert Hansen seg úr nevnd felagsins, eftir at hann frá sama degi bleiv settur sum forstjóri í felagnum. Stjórnin umfatar hereftir David Reinert Hansen, forstjóra og Finnboga Niclasen, stjóra.

Tann 15. desember 2008 varð eykaaðalfundur í P/F Vága Floghavn. Á skránni var hækking av partapeningi felagsins við 65 mió.kr. til kurs 100 ímóti kontantgjaldi og viðtøkubroyting í tí sambandi og staðfesting av avtaluni.

Partapeningur felagsins varð hækkaður við 65 mió.kr. Soleiðis hækkaði partapeningur felagsins frá kr. 100.500.000 til kr. 165.500.000, hetta við tekning av nýggjum partapeningi. Tekningin av nýggja partapeninginum fór fram til kurs 100. Nýggi partapeningurin varð teknaður við heimild í § 1, stk. 2 í løgtingslóg nr. 40 frá 21. mai 2008 um at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í P/F Vága Floghavn og høvuðskontu 6.38.2.15 í løgtingsfíggjarlógini fyri 2008. Sostatt hevur felagið í 2008 fingið fyrsta inngjaldið av trimum av teimum játtaðu 365 mió.kr. at útbyggja flogvøllin við.

Á aðalfundinum tann 15. desember 2008 bleiv Bárður Nielsen valdur sum nýggjur nevndarlimur ístaðin fyri David Reinert Hansen, sum var farin úr nevndini.

**Gongdin í virksemi og fíggjarligum viðurskiftum**
P/F Vága Floghavn røkir eina samfelagsuppgávu viðvíkjandi samskiftinum millum Føroyar og umheimin, og hevur sum so ikki til endamáls at røkka stór rakstrarlig yvirskot, men at fáa ein rakstur sum javnvigar og sum er nøktandi til at fíggja neyðugar íløgur, útskiftingar og viðlíkahald av ognum felagsins.

P/F Vága Floghavn hevði í 2008 eitt rakstrarhall uppá 11,1 mió.kr. Nevndin hevur síðani juli 2008 brúkt nógva orku til at betra um fyrisitingina og raksturin hjá P/F Vága Floghavn, men metir ikki rakstrarúrslit felagsins fyri 2008 at verða nøktandi.

Rakstrarúrslit felagsins er fyrst og fremst merkt av árligu roknskaparligu avskrivingunum av ognum felagsins, sum er 8,1 mió.kr., og av at samsvar ikki er millum tær inntøkur felagið hevur frá brúkarunum av flogvøllinum og teimum útreiðslum, sum felagið hevur av at reka flogvøllin, og sum fyrr vóru goldnar yvir donsku og seinni føroysku fíggjarlógina.

P/F Vága Floghavn hevur tikið rakstrarlán frá Føroya Banka at fíggja gjaldføristørvin fyri 2008 og íløgulán til bygging av tollfríu sølubúðunum.

Eftir at tollfría sølan á flogvøllinum er byrjað, hevur hetta bøtt uppá gjaldføri felagsins frá rakstrinum, men gevur ikki inntøkur nokk til eisini at fíggja neyðugar íløgur.

Samanumtikið metir leiðsla felagsins ikki, at ársúrslitið er nøktandi.

**Íløgur**
Ognir felagsins eru merktar av, at lítil og eingin peningur hevur verið játtaður Vága Floghavn seinnu árini til nýíløgur og útskifting av útgerð, viðlíkahald av bygningum og installatiónum o.s.fr. Felagið hevur sostatt tørv á komandi árini at gera munandi íløgur í ymiska útgerð, víðkan av hølum og viðlíkahald av og bygningum, sum koma at hava neiliga ávirkan á rakstrarúrslit felagsins komandi árini.

**Fyrisiting**
Nevndin í P/F Vága Floghavn hevur gjørt bygnaðarligar broytingar í 2008. Nevndin hevur sett forstjóra, samstundis heldur verandi stjóri heldur fram sum stjóri í felagnum.

Neyðugt hevur verið at styrkja um fíggjarliga førleikan í felagnum, og í desember 2008 varð fíggjarleiðari settur í P/F Vága Floghavn.

**Tax-Free**
P/F Vága Floghavn hevur í 2008 gjørt tollfríar sølubúðir á flogvøllinum. Talan er um tvær sølubúðir. Eina sølubúð við komu og eina við fráferð. Í hesum sambandi valdi felagið at bjóða raksturin av sølubúðunum út. Tá freistin var farin vóru innkomin 7 boð frá 4 ymiskum boðgevum. Besta boðið hevði P/F Atlantsflog og hevur P/F Vága Floghavn gjørt avtalu um rakstur av sølubúðunum við P/F Atlantsflog frá 1. november 2008 og tvey ár fram, tó við møguleika at leingja avtaluna við einum ári.

Felagið væntar, at tollfría sølan í 2009 fer at betra nakað um gjaldføri felagsins.

**Parkeringsøkið**
P/F Vága Floghavn hevur yvirtikið raksturin av parkeringsøkinum á flogvøllinum. Í hesum sambandi keypir felagið tænstur frá Sp/f Vága Vaktarhaldi viðvíkjandi dagliga rakstrinum av parkeringsøkinum. Felagið kannar møguleikarnar fyri hvussu kann betrast um parkeringsviðurskiftini í Vága Floghavn.

**Útbygging**
P/F Vága Floghavn er í 2008 farið ígongd við fyrireikingarnar at útbyggja Vága Floghavn. Felagið hevur í 2008 biðið verkfrøðingarfelag og arkitekt, um at fara ígongd við fyrstu projekteringsfasuna av útbyggingini av vøllinum og terminalinum (hugskots og programfasan), sum eru grundarlag fyri víðari arbeiði felagsins við útbyggingini.

Síðst í november 2008 vóru nevnd og stórn á kanningarferð til flogvallirnar í Billund í Danmark og Alta í Norður Noregi, har millum annað kunnað varð um útbyggingar av flogvøllum har.

Í 2008 avgjørdi felagið at bjóða virksemi út, bæði ráðgevarauppgávurnar, byggiuppgávurnar og eftirlitsuppgávurnar, í sambandi við útbygging av Vága Floghavn. Felagið gjørdi av at fáa tilboð uppá projektering av bæði einum 1600 og 1800 vølli, soleiðis at kostnaðurin av báðum møguleikum kunnu finnast og lýsast.

Felagið tók eisini avgerð um at býta verkætlanina sundur at útbyggja terminalin og vøllin hvør sær, soleiðis at full ferð kann setast á leingingina av vøllinum beinanvegin, sum nevndin metir er mest átrokandi uppgávan. Arbeiðið við víðkan av terminalinum verður sett í gongd seinni, tá ið projekteringin av leinging av vøllinum er komin longri á leið og meira nágreiniligar fíggjarligar og tekniskar metingar fyriliggja.

**Framtíðar viðurskifti**
Tað liggja stórar avbjóðingar fyri framman hjá P/F Vága Floghavn.

Í mars 2009 var útbjóðingin av ráðgevarauppgávunum at gera projekuppskot, forprojekt og detailprojekt viðvíkjandi leinging av lendingarbreytini og víðkan av trygdarøkinum á flogvøllinum lýst alment. Útboðið varð lýst alment bæði í Føroyum, Danmark, Noregi og Íslandi.

Eftir ætlan verður ráðgevarafyritøkan, sum skal standa fyri projektering av leinging av flogvølinum, vald í seinnu helvt av mai 2009, og sambært yvirskipaðu tíðarætlanini verður miðjað ímóti, at útboð og val av byggifyritøku til gerð av arbeiðinum við leinging av vølli og víðkan av trygdarøki er avgreitt umleið árskiftið 2009/10.

Út frá núverandi metingum, og uttan so er, at óvæntaðir trupulleikar koma fyri, væntast, at arbeiðið at leingja vøllin og víðka trygdarøkið verður liðugt eftir einum góðum ári, t.v.s. miðskeiðis í 2011.

Inntil projekteringin er komin longur áleiðis er ikki vissa fyri, at játtaði peningurin uppá 365 mió.kr. er nøktandi til bæði leinging av vølli, víðkan av trygdarøki, gerð av standplássum til flogfør, gerð av terminali og parkeringsøki.

Nevnd og stjórn felagsins arbeiða harumframt víðari við at betra um rakstur felagsins og at fáa javnvág millum inntøkur og útreiðslur av at reka flogvøllin, soleiðis at peningur eisini er tøkur til at gera neyðugar íløgur, útskiftingar, viðlíkahald o.a. Felagið arbeiðir í hesum sambandi við eitt nú møguleikanum at broyta uppá nýtslugjøldini fyri tær tænastur felagið veitir, við tað at hesi ikki eru dagførd síðani 2001 og ikki longur eru nøktandi til eitt nú útreiðslurnar í sambandi við øktu trygdarkrøvini fyri ferðandi um flogvøllin.

Vísandi til eitt nú tann íløgutørv felagið metir er neyðugur til viðlíkahald, útskifting og nýíløgur í útgerð, vil nevndin ikki útihýsa møguleikanum fyri, at felagið vil venda sær til politisku myndugleikarnar við áheitan um eina játtan á fíggjarlógini til tess at fremja tær íløgur, sum nevndin metir eru neyðugar, jb. viðmerkingarnar til løgtingslóg nr. 40 frá 21. mai 2008.

**Hendingar eftir roknskaparlok**
Eftir roknskaparlok er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av fíggjarligu støðu felagsins.

## HØVUÐS- OG LYKLATØL

| t.kr. | 2008 | 2007 |
|---|---|---|

**Høvuðstøl**

| | | |
|---|---|---|
| Bruttoúrslit | 11.689 | -72 |
| Rakstrarúrslit | -11.004 | -333 |
| Úrslit av fíggjarpostum | -116 | 5 |
| Úrslit av óvanligum postum | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | **-11.119** | **-328** |
| | | |
| Fíggjarstøða tilsamans | 484.140 | 227 |
| **Eginogn** | **471.564** | **172** |
| | | |
| Íløgur í materiella støðisogn | 5.777 | 0 |

**Lyklatøl**

| | | |
|---|---|---|
| Ognaravkast | -4,5% | -144,2% |
| Trygdarevni | 97,4% | 75,7% |
| Renta av eginogn | -4,7% | -190,4% |

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2008 hjá P/F Vága Floghavn.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina og galdandi roknskaparleiðbeiningar.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Ársfrásøgnin verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 24. apríl 2009

| | | |
|---|---|---|
| Stjórn: | David Reinert Hansen<br>forstjóri | Finnbogi Niclasen<br>stjóri |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nevnd: | Kitty May Ellefsen<br>formaður | | Jóhannus Egholm Hansen<br>næstformaður |
| | Bárður á Steig Nielsen | Evy Jacobsen | Jóhan í Niðristovu |

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til eigararnar í P/F Vága Floghavn**

**Átekning á ársfrásøgnina**
Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá P/F Vága Floghavn fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2008 við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, peningastreymi og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2008 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2008 samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tórshavn, tann 24. apríl 2009

**Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT***
løggilt grannskoðaravirki

| | |
|---|---|
| Jógvan Amonsson | Jógvan Joensen |
| statsaut. revisor | løggildur grannskoðari |

**RAKSTRARROKNSKAPUR**
**1. januar - 31. desember**

| | Nota | 2008 | t.kr. 2007 |
|---|---|---|---|
| **Bruttoúrslit** | | **11.688.524** | **-72** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -14.582.192 | -261 |
| Avskrivingar av materiellari støðisogn | | -8.109.872 | 0 |
| **Rakstrarúrslit** | | **-11.003.540** | **-333** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 62.972 | 5 |
| Fíggjarligur kostnaður | | -178.743 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-11.119.311** | **-328** |
| Skattur av ársúrsliti | 2 | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **-11.119.311** | **-328** |
| | | | |
| **Uppskot til býti av ársúrsliti** | | | |
| Vinningsbýti fyri roknskaparárið | | 0 | 0 |
| Flutt úrslit | | -11.119.311 | -328 |
| **Býtt tilsamans** | | **-11.119.311** | **-328** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| OGN | Nota | 2008 | t.kr. 2007 |
|---|---|---|---|
| Lendi og flogbreyt | | 348.596.119 | 0 |
| Bygningar, brunnar v.m. | | 48.641.086 | 0 |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | | 18.396.426 | 0 |
| **Materiell støðisogn** | 3 | **415.633.631** | **0** |
| **STØÐISOGN** | | **415.633.631** | **0** |
| Áogn frá sølu | | 1.196.321 | 0 |
| Onnur áogn | | 710.751 | 8 |
| Tíðaravmarkingar | | 158.264 | 0 |
| **Áogn** | | **2.065.336** | **8** |
| **Peningur** | | **66.441.081** | **220** |
| **OGN Í UMFERÐ** | | **68.506.416** | **227** |
| **OGN TILSAMANS** | | **484.140.048** | **227** |

**FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER**

| SKYLDUR | Nota | 2008 | t.kr. 2007 |
|---|---|---|---|
| **Partapeningur** | | **165.500.000** | **500** |
| Yvirkursur av partabrævaútgávu | | 306.064.104 | 0 |
| Flutt úrslit | | 0 | -328 |
| **EGINOGN** | 4 | **471.564.104** | **172** |
| Bankaskuld | 5 | 1.875.000 | 0 |
| **Langfreistað skuld** | | **1.875.000** | **0** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 5 | 678.498 | 0 |
| Skuld til peningastovnar | | 1.338.882 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 7.782.828 | 48 |
| Onnur skuld | | 900.736 | 7 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **10.700.944** | **55** |
| **SKULD** | | **12.575.944** | **55** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **484.140.048** | **227** |

**GJALDFØRISFRÁGREIÐING**
**1. januar - 31. desember**

| | Nota | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| Rakstrarúrslit | | -11.003.540 | -333 |
| Av- og niðurskrivingar v.m. | | 8.109.872 | 0 |
| | | **-2.893.668** | **-333** |
| Broytingar í ogn í umferð | | | |
| Áogn frá sølu | | -1.196.321 | 0 |
| Onnur áogn | | -703.033 | -8 |
| Tíðaravmarkingar | | -158.264 | 0 |
| Broytingar í stuttfreistaðari skuld | | | |
| Vøru- og tænastuskuld | | 7.734.519 | 48 |
| Onnur skuld | | 893.867 | 7 |
| **Gjaldførisúrslit frá rakstri áðrenn fíggjarpostar og skatt** | | **3.677.101** | **-286** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 62.972 | 5 |
| Fíggjarligur kostnaður | | -178.743 | 0 |
| Goldin skattur í árinum | | 0 | 0 |
| **Gjaldførisúrslit, rakstur** | | **3.561.330** | **-280** |
| Íløgur - materiell støðisogn | | -5.776.527 | 0 |
| **Gjaldførisúrslit, íløgur** | | **-5.776.527** | **0** |
| Bankakuld, netto | | 2.553.498 | 0 |
| Skuld til peningastovnar | | 1.338.882 | 0 |
| Kostnaðir í sambandi við flytan av virksemi í felagið | | -455.750 | 0 |
| Inngoldin partapeningur | | 65.000.000 | 500 |
| **Gjaldførisúrslit, fígging** | | **68.436.630** | **500** |
| **Gjaldførisúrslit, netto** | | **66.221.432** | **220** |
| Tøkur peningur við roknskaparbyrjan | | 219.648 | 0 |
| **Tøkur peningur við roknskaparlok** | | **66.441.081** | **220** |

## NOTUR

| | 2008 | t.kr. 2007 |
|---|---|---|
| **Nota 1. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Starvsfólk í miðal | 37 | 0 |
| | | |
| **Samlaður starvsfólkakostnaður:** | | |
| Lønir | 13.039.022 | 253 |
| Aðrar samsýningar | 24.163 | 0 |
| Eftirlønir | 1.353.538 | 0 |
| Onnur sosial gjøld | 165.468 | 8 |
| | **14.582.192** | **261** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 2. Skattur av ársúrsliti** | | |
| Roknaður skattur av skattskyldugu inntøkuni í árinum | 0 | 0 |
| Broyting í útsettum skatti | 0 | 0 |
| | **0** | **0** |

| **Nota 3. Materiell støðisogn** | Lendi og flogbreyt | Bygningar, brunnar v.m. | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2008 | 0 | 0 | 0 |
| Tilgongd í sambandi við apportinnskot | 350.956.786 | 47.248.200 | 19.761.990 |
| Tilgongd síðani yvirtøku av virksemi | 0 | 2.838.657 | 2.937.870 |
| Frágongd | 0 | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2008** | **350.956.786** | **50.086.857** | **22.699.860** |
| | | | |
| Avskrivingar 1. januar 2008 | 0 | 0 | 0 |
| Avskrivingar í árinum | 2.360.667 | 1.445.771 | 4.303.434 |
| **Avskrivingar 31. desember 2008** | **2.360.667** | **1.445.771** | **4.303.434** |
| | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2008** | **348.596.119** | **48.641.086** | **18.396.426** |

**Nota 4. Eginogn**

**Rørslur í eginognini 2007**

| | 1. januar | Kapitalhækking | Aðrar rørslur | Uppskot til býti av ársúrsliti | 31. desember |
|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 0 | 500.000 | | | 500.000 |
| Yvirkursur av partabrævaútgávu | 0 | | | | 0 |
| Flutt úrslit | 0 | | | -327.811 | -327.811 |
| Uppskot til vinningsbýti | 0 | | | | 0 |
| | **0** | **500.000** | **0** | **-327.811** | **172.189** |

**Rørslur í eginognini 2008**

| | 1. januar | Kapitalhækking | Aðrar rørslur | Uppskot til býti av ársúrsliti | 31. desember |
|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 500.000 | 165.000.000 | | | 165.500.000 |
| Yvirkursur av partabrævaútgávu | 0 | 314.318.200 | -8.254.096 | | 306.064.104 |
| Flutt úrslit | -327.811 | | 11.447.122 | -11.119.311 | 0 |
| Uppskot til vinningsbýti | 0 | | | | 0 |
| | **172.189** | **479.318.200** | **3.193.026** | **-11.119.311** | **471.564.104** |

| | 2008 | t.kr. 2007 |
|---|---|---|
| **Partapeningur** | | |
| Partapeningurin er býttur soleiðis: | | |
| 1 stk. áljóðandi 500.000 kr. | 500.000 | 500 |
| 1 stk. áljóðandi 100.000.000 kr. | 100.000.000 | 0 |
| 1 stk. áljóðandi 65.000.000 kr. | 65.000.000 | 0 |
| Øll partabrøvini hava somu rættindi | **165.500.000** | **500** |

**Nota 5. Langfreistað skuld**

| | 1/1 2008 Skuld í alt | 31/12 2008 Skuld í alt | Avdráttur komandi ár | Restskuld eftir 5 ár |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til peningastovnar | 0 | 2.553.498 | 678.498 | 0 |
| | **0** | **2.553.498** | **678.498** | **0** |

**Ognarviðurskifti**

Hesir partaeigarar eru skrásettir í felagsins partabrævabók við einum ognarluti uppá í minsta lagi 5% av atkvøðurættinum ella í minsta lagi 5% av partapeninginum:

Føroya Land

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin hjá P/F Vága Floghavn fyri 2008 er gjørd í samsvari við ásetingarnar fyri fyritøkur í flokki B í ársroknskaparlógini og eftir galdandi roknskaparleiðbeiningum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkurnar innroknaðar í stigum, so hvørt tær eru vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar og niðurskrivingar.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva fyritøkuni fíggjarligar fyrimunir, og virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr fyritøkuni, og virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligan avdrátt, umframt ískoyti/frádrátt av akkumuleraðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapum og váðum, ið vóru væntað við roknskaparlok, sum síðan eru sannað ella avsannað, innan framløguna av ársfrásøgnini.

Roknskaparliga virðið á immateriellari og materiellari støðisogn verður gjøgnumgingið árliga, fyri at staðfesta um ábendingar eru um størri virðisminkingar, enn tær, sum eru í regluligu avskrivingunum. Um so er verður niðurskrivað til tað lægra endurútveganarvirðið.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Nettosøla

Nettosøla av handilsvørum og lidnum vørum verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði er farin til keypara innan roknskaparlok. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald og við frádrátti av avsláttri í sambandi við søluna.

### Aðrar rakstrarinntøkur og -kostnaðir

Aðrar rakstrarinntøkur og -kostnaðir eru roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá fyritøkuni.

### Annar uttanhýsis kostnaður

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, leigu, tap av áognarum, operationellum leasingkostnaðum v.m.

**Fíggjarligir postar**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum. Fíggjarligu postarnir fevna um rentuinntøkur og -kostnaðir, fíggjarligar kostnaðir av fíggjarligari leasing, staðfestir og ikki staðfestir kursvinningar og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og handlan í frammandum gjaldoyra.

**Skattur**

Skattur av ársúrslitinum, ið fevnir um skattin fyri árið og broytingina í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum, og innroknaður beinleiðis á eginognina við tí parti, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognina.

**FÍGGJARSTØÐAN**

**Materiell støðisogn**

Lendi og flogbreyt, bygningar, brunnar v.m., umframt onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv verða tikin við til útveganarvirðið, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar.

Avskrivingargrundarlagið er útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Lendi og flogbreyt verða ikki avskrivað, meðan slitlag og aðrar innleggingar verða avskrivaðar.

Útveganarvirðið fevnir um keypsprísin, umframt kostnað, ið beinleiðis er knýttur at ognini, til hon er klár at taka í nýtslu. Fyri ognir, sum felagið sjálvt ger, fevnir útvegnarvirðið um beinleiðis og óbeinleiðis kostnað til lønir, tilfar og tænastur frá undirveitarum.

Tær linjeru avskrivingarnar eru grundaðar á fylgjandi metingar av væntaðu livitíðini og restvirðinum hjá ognunum.

| | Nýtslutíð | Restvirði |
|---|---:|---:|
| Slitlag o.a. | 15 ár | 0 - 20% |
| Bygningar, brunnar v.m. | 50 ár | 0 - 20% |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 5-15 ár | 5% |

Vinningur ella tap við avhendan av støðisogn verða uppgjørd sum munurin millum søluprís, frádrigið sølukostnað, og tað roknskaparliga virðið á søludegnum. Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir avskrivingum.

**Áogn**

Áogn er tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Virðið verður niðurskrivað eftir møguligum tapsvanda.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar undir ognum er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárum.

**Vinningsbýti**

Uppskot til vinningsbýti fyri roknskaparárið verður tikið við sum serstakur postur undir eginognini. Uppskot til vinningsbýti verður tikið við sum skylda, tá tað er samtykt á aðalfundi.

**Skyldugur skattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur og skattaáogn verða tikin við í fíggjarstøðuna, sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku, við møguligum javningum fyri skatti frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðugrundaða skuldarháttinum av fyribils mununum millum roknskaparliga og skattliga virðið á ognum og skyldum, uppgjørd við grundarlagi í ætlaðu nýtsluni av ognini ella afturrindanini av skylduni.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið av framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður innroknað við til virðið, sum ognin væntandi verður realiserað fyri. Antin við javnan í skatti av framtíðarinntøkum, ella við mótroknan av útsettari skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður útroknaður við grundarlagi í galdandi skattareglum og skattaásetingum, sum við roknskaparlok eru galdandi, tá útsetti skatturin væntandi verður útloystur. Broytingar í útsetta skattinum, sum eru avleiðingar av broytingum í skattasatsum, verða tiknar við í rakstrarroknskapinum. Í hesum árinum er skattasatsurin 18%.

**Skuld**

Fíggjarligar skyldur verða innroknaðar sum lántøka til útveganarvirði, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verða fíggjarligar skyldur innroknaðar til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin, millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innrokaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Veðskuld er tískil innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum fyri kontantlán svarar til restskuldina á láninum. Fyri brævalán svarar amortiseraða útveganarvirðið til eina restskuld, roknað sum lánsins undirliggjandi kontantvirði á upptøkudegnum. Harumframt verður kursmunurin avskrivaður yvir avdráttar-tíðina.

Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, skuld til atknýttar fyritøkur og onnur skuld, verða tiknar við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virði.

**Umrokning av fremmandum gjaldoyra**

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyramunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin, sum ein fíggjarpostur. Um gjaldoyrapositiónir verða sæddar sum tryggingar fyri framtíðar peningastreymum, verða virðisjavningarnar innroknaðar beinleiðis á eginognina.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða innroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum inntøkum og kostnaðum.

Støðisognir, ið eru keyptar í fremmandum gjaldoyra, verða innroknaðar til kursin á handilsdegnum.

## GJALDFØRISFRÁGREIÐING

Gjaldførisfrágreiðing er uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir gjaldførisávirkanina frá rakstri, íløgum og fígging.

Gjaldføri við roknskaparbyrjan og við roknskaparlok er samansett av tøkum peningi og innistandandi í peningastovni.

## LYKLATØL

Lyklatølini, sum standa í brotinum høvuðs- og lyklatøl í ársfrágreiðingini, eru roknað soleiðis:

$$\text{Ognaravkast} = \frac{\text{Rakstrarúrslit x 100}}{\text{Miðal ognir}}$$

$$\text{Trygdarevni} = \frac{\text{Eginogn x 100}}{\text{Skyldir tilsamans}}$$

$$\text{Renta av eginogn} = \frac{\text{Ársúrslit x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$$